Álit

í

løgtingsmáli nr. 30/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Leingja gildistíðina á rættindum)

Beinir Johannesen, Jacob Vestergaard, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Jørgen Niclasen, Bárður á Lakjuni og Grímur Sundstein, løgtingslimir, hava vegna Fólkaflokkin lagt málið fram 5. oktober 2023, og eftir 1. viðgerð tann 17. oktober er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18. oktober og 1., 8. og 15. november 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar til málið:

Tað er neyðugt, at fiskivinnan hevur støðugar og greiðar karmar at virka undir. Gildistíð á veiðiloyvum er ein sera grundleggjandi partur av kørmunum.

Fiskimálaráðharrin hevur verið úti alment og sagt, at hann tekur undir við tí leistinum, hesi rættindini verða givin eftir í dag. Tó er ein munur. Hann hevur sagt, at loyvistíðin skal vera 10 ár, meðan meirilutin er av teirri fatan, at 12 ár er betri.

Orsøkin til at 12 ár er betri er, at tað fyri reiðarí, sum ikki eru fult so væl fyri sum tey allarbestu, er lættari at fáa eitt roknistykki at hanga saman, tá avskrivingartíðin kann vera 12 ár heldur enn 10 ár. Hetta er eisini viðvirkandi til, at tað gerst lættari at fáa lánveitarar at veita fígging til nýíløgur í skip. Sannlíkindini fyri, at fleiri hava møguleika at gera íløgur í nýggj vinnutól við 12 ára gildistíð, eru einfalt størri, enn tá tíðin er 10 ár. Stórir partar av flotanum eru framvegis sera gamlir, so tørvurin á nýíløgum er stórur.

Víst verður eisini til álitið frá meirilutanum í løgtingsmáli nr. 75/2022.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur upplýst fyri nevndini, at samgongan hevur ætlanir um, at gildistíðin á veiðiloyvum frameftir skal verða 10 ár.

Meirilutin heldur tó, at so leingi ongin endalig støða er tikin til, hvussu komandi gildistíðin í sjófeingislógini skal verða, eigur galdandi áseting um 12 ár at verða galdandi.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Annika Olsen, Karlot Hergeirsson og Uni Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur ikki undir við uppskotinum vísandi til, at samgonguflokkarnir ætla at stytta loyvistíðarskeiðið, og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur undir nevndarviðgerðini upplýst, at hann ætlar at bera Løgtinginum uppskot um tað á heysti í 2024.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja málið.

Vinnunevndin, 11. desember 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstforkvinna	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	